## Deyvafelag Føroya

### Søkir eftir **Skrivstovufólki**

Í samband við at skrivstovufólk okkara fer í farloyvi, søkist eftir einum skrivstovufólki til setan frá 1. august 2007 og fram til summarið 2008. Talan er um eitt hálvtíðarstarv.

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:**
- Dagliga gongdin hjá Deyvafelagnum og Deyvahúsinum.
- At fyrisita Deyvafelagið undir leiðslu av nevnd felagsins.
- At skipa fyri fundum í Deyvafelagnum.
- Samskifti Deyvafelagsins við almennu myndugleikarnar.
- Samskifti Deyvafelagsins við tænastuveitandi stovnar, t.d. viðv. Sjónvarp Føroya o.ø..
- Samskifti Deyvafelagsins við útheimin m.a. Norðurlandaráðið hjá Deyvum og Danske Døves Landsforbund.
- At savna tilfar til heimasíðu Deyvafelagsins – www.deaf.fo.
- At hjálpa leiðsluni (nevndini) í Deyvafelagnum at fyriskipa tiltøkum Deyvafelagsins.
- Dagliga samskiftinum við limir Deyvafelagsins.
- Innsavning til rakstur Deyvafelagsins.
- Dagliga rakstrinum (m.a. útleiguvirksemi) og viðlíkahald av Deyvahúsinum.

**Neyðug førleikakrøv og persónsmenska:**
Søkt verður eftir fólki, ið kann arbeiða sjálvstøðugt, hevur útbúgving og royndir innan vanligt skrivstovuarbeiði og annars røkja omanfyrinevndu uppgávurnar.

Men fyrst og fremst verður dentur lagdur á, at umsøkjarin hevur hug og hegni at seta seg inn í viðurskiftini teirra deyvu, at taka til sín deyvamentanina, at hava áhuga í at læra teknmál, og annars er sinnaður at brúka part av orku síni at menna lívsvirði teirra deyvu.

**Arbeiðstíð og løn:**
Starvið er ½-tíðarstarv, og verður arbeiðstíðin annars ásett í samráð við leiðslu Deyvafelagsins. Lønin er ásett sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til **Bjørg Hjelm á tlf.nr. 31 75 97 ella 51 75 97**

Umsóknir skulu verða Deyvafelagnum í hendi í seinasta lagi 23. juni 2007 og verður at senda skrivliga til

**Deyvafelag Føroya**
Postboks 2001
FO-165 Argir

## Sp/f Andrias Berg

Entreprenørvirkið
Marinargøta 6 · 188 Hoyvík
Tlf. 31 65 58 / 21 65 58

**Søkt verður eftir førara til lítlan kranabil. Fyrimunur er, um viðkomandi eisini kann koyra gravimaskinu.**

**Talan verður um fast arbeiði.**

VESTMANNA KOMMUNA

## NÁMSFRØÐINGAR TIL DAGSTOVNIN GJÁARLON Í VESTMANNA

Søkt verður eftir 2 námsfrøðingum til Gjáarlon at byrja 01. 09. 07.

Talan er um fulltíðarstørv við møguleika at arbeiða niðursetta tíð . Størvini verða sett eftir avtalu.

Dagstovnurin er í 5 eindum við vøggustovu og barnagarði – normeraður til 84 børn.

Stovnurin letur upp kl. 7:15 og letur aftur kl.17.15.

Gjáarlon er ein grønur stovnur, sum leggur dent á at fara væl um umhvørvið – inni sum úti.

Umstøðurnar eru sera góðar – bæði innan og uttandura.

**Í tí dagliga arbeiðinum leggja vit dent á :**
- Trivnaðin hjá starvsfólkum og børnum
- At skapa álit og tryggleika fyri børn og foreldur
- At vit eru ein grønur stovnur

**Vit ynskja :**
- At tú hevur førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- At tú ert ágrýtin og nýhugsandi
- At tú ert við til at menna tað pedagogiska arbeiði
- At tú kannst taka ábyrgd og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- At tú sært møguleikar og avbjóðingar fram um forðingar

**Lønarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Morið A. O. Gardy, leiðara, á tlf. 470134 / 230134 ella Marin í Niðristovu Durhuus, varaleiðara, á tlf. 470138 / 230138.

**Umsóknir**
saman við avriti av prógvum og viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. juli kl. 12.00 og sendast til:

Gjáarlon
Hornavegur 16
FO-350 Vestmanna
Umsóknir skulu merkjast: »Námsfrøðingar«

Um ongin námsfrøðingur søkir, verða hjálparfólk fyribils sett í størvini.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Setanarsamrøður verða í viku 28.

DAGSTOVNURIN GJÁARLON

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

## STARVSFÓLK TIL STATOIL ARGIR

Statoil Argir sóknast eftir dugnaligum starvsfólki til at arbeiða skiftandi vaktir. Uppgávurnar eru: Kassin og annað vanligt handils arbeiði.

Statoil Argir leggur stóran dent á at veita góða tænastu.

Ert tú fyrikomandi, smílandi, og eldri enn 16 ár? So er tað kanska júst tær vit leita eftir.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Róa Snorrason á tlf. 56 40 16.

Ljóðar hettar sum tú? Send so eina skrivliga umsókn til:

**Statoil Argir**
Traðargøta 41
FO-160 Argir

STATOIL




## Feriuavloysari

Feriuavloysari søkist at byrja skjótast gjørligt. Møguleiki er fyri føstum starvi.

**Ring á tlf. 50 51 91**



## 6 Go-cart til sølu

Fullfíggja Go-cart útgerð, 6 bilar í góðum standi, 2 40 fóts containarar og 400 dekk + nógvir eykalutir.
Selist um nøktandi boð fæst.

**Tlf. 211695**